tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 9 Fríggjadagur 14. januar 2000 74. árgangur www.sosialurin.fo Kr. 10,00

# Kreppan útsett

## Málið um uppsagnirnar á Landssjúkrahúsinum er fyribils útsett til 1. apríl



ÁKI BERTHOLDSEN

**Tað nýggjasta um sparingarnar:** Beint áðrenn blaðið fór til prentingar var fundurin millum deildarleiðarar á Landssjúkrahúsinum og ovastu leiðsluna liðugur.

Fundurin skuldi vera klokkan 13 í gjár. Endamálið við honum var m. a. at seta nøvn á tær 20-27 ætlaðu uppsagnirnrar.

Men so langt kom tað ikki. Partarnir samdust um at útseta málið, tó verða nakrar sparingar settar í verk. Tær sparingarnar eru sum ætlað at sjúkraflutningstænasta, vekslarin og húsavørðurin verða løgd saman.

Hetta sparir fýra fólk.

Somuleiðis verða sparingarnar á snikkaraverkstaðnum og maskinverkstaðnum settar í verk.

Hetta sparir seks fólk.

Men hini 10-17 fólkini verða ikki uppsøgd enn. 12 sjúkrasystrar, báðir laborantarnir og sjúkraflutningstænastan í Eysturoynni verða ikki uppsøgd enn.

Partarnir eru samdir um at bíða við málinum til nýggi sjúkrarøktarstjórin tekur við starvinum 1. apríl. Tá verður málið viðgjørt av nýggjum.

**Lesið annars meira um málið á síðu 5-6**



## Ynskja føroyska fjølmiðlalóg

Danir vilja ikki góðtaka føroyskar broytingar. Tí mælir landsstýrið til føroyska fjølmiðlaábyrgdarlóg

**Síða 7**



## Noyðir barnakonur heim

Barnasjúka, nevnd lúsingasjúkan, herjar landið. Sjúkan smittar barnakonur á dagstovnum og noyðir tær heim **Síða 10**

# Koltur 2 mió frá Carlsberg



Bjørn Paturson greiddi í summar ferðamanni frá ætlanunum um at seta í stand gamla býlingin í oynni. Ferðamaðurin var frá Carlsberg, og úrslitið gjørdist 2 mió

**Síða 9**

**Trukkar, stáblarar og BT lyftivognar til tygara tørv!**




Vit útvega EXIDE battaríir, løðitól til **øll merkir** av trukkum og stáblarum

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**

Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

**Hevur tú ikki fingið**

Tíðindablaðið **sosialin**

Vit gera alt, hvat vit kunnu, fyri at haldarar fáa leygardagsblaðið til tíðina. Men villur kunnu koma fyri, og um tú ikki hevur fingið blaðið fríggjakvøldið, ring so tel. 21 41 18, so vit kunnu syrgja fyri, at tú fært blaðið

Tíðindablaðið sosialurin

**PRENT?**

…arbeiðsseðlar, álit, ársfrágreiðingar, ársroknskapir, blokkar, bløð, bóklingar, brævbjálvar, brævpappír, bøkur, faldarar, gávukort, gravsálmar, innbjóðingarkort, jólakort, klistrimerki, kvittanir, listabøkur, lógarsøvn, lutaseðlar, mappur, orðabøkur, plakatir, postkort, príslistar, produktbløð, putlispøl, rokningar, sanghefti, skreytbløð, takkarkort, visittkort (og nú er tíverri onki plás eftir, ring og spyr)…

Spf. **HESTPRENT**

Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

**Sp/f V.V.S. Hornið**
Lágpríshandil

Alt innan hitaverk & sanitet so sum:

**Stoypijarnsketil • Sanitet Kranar • Baðirúmsmøblar**

Støkk inn á gólvið ella ring:
**Landavegur 2, Tórshavn**
**Tlf. 318023/Fax 310963**

**Runavík tlf. 447773**
Opið er í Runavík mikudag kl. 13-17.30 og leygardag kl. 10-14.